## Atlantic flýgur úr Manchester

Ovurstórur áhugi er í Manchester fyri at sleppa til Føroya, og á Atlantic Airways arbeiða tey við at nøkta eftirspurningin. Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways sigur, at tey alt fyri eitt hava merkt, at nógvir áskoðarar fegnir vilja við Manchester City, sum um góðar tvær vikur skal spæla á Tórsvølli. - Í fyrsta umfari hava vit roynt at víst til vanliga rutunetið, har til ber at flúgva til Føroya úr London, ella umvegis Billind, Keypmannahavn og Reykjavík. - Men hartil arbeiða vit so eisini við at seta eitt ella tvey charterflogfør inn, sum skulu flúgva beinleiðis úr Manchester. Hetta er tó langt ífrá nóg mikið, men talan er um avmarkaða orku hjá okkum, nú talan er um hægstu ferðavinnutíð, sigur Magni Arge.



## Julian heldur fram á Amager

Julian Hansen hevur saman við Michael Madsen skrivað undir nýggjan trý ára sáttmála sum venjarapar hjá FC Amager. Skútan hjá Fremad Amager vendi veruliga, tá venjaraskifti varð framt í vár. Fremad Amager endaði kappingarárið við at vinna sær uppflyting til donsku 1. deild, og har verður tað eisini við dansk/føroyska venjaraparinum. - Bæði eg og felagið hava somu ambitiónir. Og eg gleði meg til at halda fram við samstarvinum við Julian og spælarahópinum, sigur Michael Madsen í tíðindaskrivi, sum er sent út í kvøld.

# Kundi valla blivið verri



**- Hatta var bestemt ikki dreymalutakastið hjá okkum, viðgongur skrivarin hjá NSÍ, Edmund Joensen**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Talan gjørdist ikki um nakað dreymalutakast, tá NSÍ í gjár skuldi fáa sítt mótstøðulið úr UEFA-pottinum. Dynamo Tblisi eitur liðið og er tað úr Georgia. Av føroysku feløgunum hevur HB fleiri ferðir verið í Georgia, og langt ífrá hvørja ferð hevur talan verið um so øgiliga hugaliga fótbóltsferð.

Skrivarin hjá NSÍ, Edmund Joensen, viðgongur eisini, at tað ikki júst varð ynski mótstøðuliðið, sum varð drigið úr pottinum í gjár. – Nei, hatta var bestemt ikki dreymalutakastið hjá okkum. Tað kundi valla blivið nógv verri, sigur Edmund Joensen, og sipar til, at reint ítróttarliga passa liðini eystani frá, ofta øgiliga illa Føroyum, og at fíggjarliga er ein dyggur smeitur. – Vit vónaðu sjálvandi at trekkja eitt lið úr grannalagnum, men so var ikki, ásannar Edmund Joensen, sum tó roynir at síggja tað positiva í lutakastinum. – Kanska vit vinna og møta Panathinaikos, tað hevði ikki verið so galið, sigur Edmund Joensen at enda.

## 67 manningar á fjarðastevnu

**23 barnamanningar og 44 manningar til FM-róðrarnar eru til reiðar at rógva, nú fjarðastevna verður hildin í Vestmanna. Startrøðin er løgd eftir, hvussu úrslitini vóru á seinastu FM-stevnuni, og liggja bátarnir í hesi røð á startmálinum.**

**Barnaróður, dreingir**
4 Drekin
5 Ørnin
6 Frúgvin
7 Títlingur
8 Jallurin
9 Teistin
10 Blikur
11 Spógvin
12 Junkarin
13 Havfrúgvin

**Barnaróður, gentur**
3 Junkarin
4 Falkur
5 Hvassi
6 Kollur
7 Tjaldrið
8 Frúgvin
9 Fípan Fagra
10 Teistin
11 Ørnin
12 Títlingur
13 Spógvin
14 Tambar
15 Blikur

**5-mannafør, gentur**
6 Tambar
7 Junkarin
8 Drekin
9 Hvassi
10 Jallurin
11 Firvaldur
12 Blikur (G)

**6-mannafør, kvinnur**
7 Fortuna
8 Gongurólvur
9 Jarnbardur
10 Lómur (G)

**5-mannafør, kvinnur**
6 Báran
7 Katla
8 Frúgvin
9 Sílið
10 Erla Kongsdóttir
11 Ritan
12 Blikur (G)

**6-mannafør, menn**
5 Lómur
6 Rádni
7 Hósvíkingur
8 Sundabáturin
9 Riddarin
10 Tvørabáturin
11 Gongurólvur
12 Fortuna

**8-mannafør**
7 Kvívíkingur
8 Árnfirðingur
9 Heiðabáturin
10 Argjabáturin

**5-mannafør, dreingir**
5 likur
6 Strípan
7 Tjaldrið
8 Havfrúgvin
9 Sílið
10 Junkarin
11 Teistin (G)
12 Katla
13 Jallurin

**10-mannafør**
7 Eysturoyingur
8 Havnarbáturin
9 Ormurin
10 Nólsoyingur
11 Vestmenningur

# Brøndby og B36 fegnast

**Martin Ericsen hjá Brøndby og Havgrímur Johannesen hjá B36 eru á einum málið um, at mótstøðuliðið teir drógu, kundi valla verið betri**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



Havgrímur Johannesen, ið er ein av teimum, sum tekur sær av Formulaliðnum hjá B36, var ógvuliga fegin um lutakastið hjá sínum felag.

– Síggja vit burtur frá lutakastinum hjá EB/Streymi, so kundu vit ikki fingið betri mótstøðulið. Brøndby er fantastiskt hjá okkum, staðfestir Havgrímur Johannesen, sum nevnir fleiri ymsar orsøkir til tess:

– Tað er stutt at ferðast, og tað er bíligt hjá okkum. Vit koma eisini til kendar umstøður, sum eisini hevur stóran týdning, metir Havgrímur Johannesen, sum eisini heldur, at reint ítróttarliga er Brøndby heldur ikki av leið hjá B36. Havgrímur Johannesen skal nú til at fyrireika Danmarkarferðina hjá B36, men hevur tó tíð at geva venjaranum hjá hinum føroyska liðnum í UEFA-Cup, EB/Streymi, eini góð ráð á vegnum:

– Hevði eg verið Sigfríður Clementsen, so hevði eg fari beint oman í Kiosk Aktiv og keypt ein lottoseðil, tí hann hevði garanterað vunnið tíggju milliónir, so heppin hasin maðurin hevur verið seinastu tíðina, argar Havgrímur Johannesen.

### Brøndby skal víðari

Svenski miðvallarleikarin hjá Brøndby, Martin Ericsen, hevur fyri donskum miðlum sagt, at lutakastið hjá hansara felag var so at siga optimalt.

– Eg metti, at eitt lið frá Føroyum ella Luksemburg vildi hóska okkum best. Tá tað er sagt, so kenni eg einki til B36 og kann tískil ikki meta um, hvussu sterkt liðið er, sigur Martin Ericsen við heimasíðuna hjá Brøndby. Hann sigur eisini, at hóast øll liðini í modernaðum fótbólti hava uppiborið virðing, so er tað eitt krav hjá Brøndby, at teir spæla seg víðari.